# Lakeside Sightseeing




Lakeside var navnið, sum bretsku hermenninir góvu bygdini Vatnsoyrar undir krígnum, og hetta navnið hevur Ólavur Poulsen tikið til sín í sínari fyritøku, sum kallast Lakeside Sightseeing. Her gevur Ólavur ferðafólki, bæði føroyskum og útlendskum, ein møguleiki at sigla á Leitisvatni, og so sleppa tey í land úti á Oyrum, har tað er sera vakurt og friðarligt.

Sosialurin var ein túr við Ólavi, meðan hann hevði eitt ferðalag við, og hetta bleiv ein ógloymandi túrur. Meðan vit sigldu út á Oyrar, fingu vit ein góðan bita at eta, so tá vit komu út, vóru øll ferðafólkini mett og væl sett. Vit fóru í land við suðurendan av Leitisvatni, og so fóru vit øll út á ein gongutúr úti á oyrum. Vit gingu heilt út ímóti havinum, har vit sóu niðuryvir Bøssdalafoss. Í havsbrúnni hómaðist eisini Skúvoyggin, Dímun og Suðuroyggin, og hetta var ein sera vøkur sjón. Síðani gingu vit víðari, og áðrenn vit fóru aftur til bátin, sóu vit omanyvir ein Geituskorardrang, sum stendur við suðurendan av Vagoynni. Vit sóu eisini vestur á Mykines henda vakra sólskinsdag. Ein sera vøkur sjón.

Meðan vit sigldu innaftur bleiv dúgliga práta um, hvussu góður hesin túrurin hevði verið henda vakra várdagin í apríl.



















